# ítróttur

Nr. 29 • hósdagur • 12. februar 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo


**Høvuðstøl úr roknskapinum (í tkr.)**

| | 2003 | 2002 |
|---|---|---|
| A-landslið, netto | 8.995 | -1.1726 |
| Aðrar inntøkur | 7.654 | 5.894 |
| Kostnaður, onnur landslið | -1.882 | -1.581 |
| Umsitingarkostnaður | -3.467 | -3.323 |
| Úrslit áðrenn rentur | 11.301 | -737 |
| Ársúrslit | 10.310 | -1.242 |
| Eginogn | 15.819 | 5.466 |
| Fíggjarjavnvág | 21.398 | 16.593 |

# 10 milliónir í FSF-kassan

**Undankappingardysturnir móti Týsklandi vóru so sanniliga gull verdir fyri føroyskan fótbólt**



*Góða lutakastið í seinastu EM-undankappingini viðførdi eitt satt pengaregn oman yvir FSF, og við Fraklandi í komandi bólkinum tykist gongdin halda fram*


FSF-ROKNSKAPURIN
*Jákup Mørk*


»Høvdu vit ikki havt hepnið við okkum hesaferð, so hevði vandi verið fyri, at vit høvdu verið noyddir at skert aktivitetin hjá Fótbóltssambandinum.«

Somikið bersøgin var táverandi FSF-formaðurin, Torleif Sigurðsson, tá tað fyri góðum tveimum árum síðani varð staðfest, at Føroyar loksins høvdu fingið ein av fíggjarligu tungvektarunum í okkara undankappingarbólk.

Saman við Týsklandi var Skotland avgjørt eitt av liðunum, sum vóru verd at koma í bólk saman við, og nú ársroknskapurin fyri 2003 skal leggjast fram leygardagin, kann í øllum førum staðfestast, at hetta kastaði pengar av sær í annars soltna FSF-kassan. Nógvar pengar.

### Hús við 15 mió

Rakstrarroknskapurin fyri 2003 vísir nevnliga eitt úrslit á 10.309.537 krónur, og tað er so nógv tað besta úrslitið, sum Fótbóltssambandið nakran tíð hevur havt. Kassakreditturin, sum við ársbyrjan var trektur niður á 2.843 tkr. er nú burtur, og ístaðin hevur FSF tøkan pening upp á 3.394 tkr.

Og tað er A-landsliðið, sum eigur so nógv tann størsta partin av heiðirinum fyri, at úrslitið hjá FSF er somikið gott. Sjónvarpsrættindi, sum í 2002 vóru 504 tkr., vóru í fjør 11.153 mió kr., og eisini atgongumerkini góvu eina fitta millión meira í inntøku, nú tað bar til at hava fullsettan leikvøll.

Hinvegin vóru útreiðslurnar av landsliðnum eisini nakað størri. 4.539 tkr. mótvegis 3.481 tkr. í 2002, men tað má roknast sum smávegis munur sammett við innøtøkurnar.

Í aðrar mátar líkist roknskapurin sær sjálvum. Útreiðslurnar av yngru landsliðunum og umsiting annars var nakað størri í 2003 enn í 2002, men tó á ongan hátt soleiðis, at talan var um nakað alarmerandi tal. Størsta broytingin í so máta eru avskrivingarnar, sum eru nærum trífaldaðar, nú bygningurin við Tórsvøll stendur liðugur. Bygningurin saman við raktrargøgnum annars stendur, nú hann er liðugur, í 15.212 tkr. Takkað verið stuðli úr ymsum grunnum, so er skuldin hjá FSF tó ikki meira enn 5.142 tkr., meðan samlaði eginpeningurin er 15.819 tkr.

# Hvussu nógv eru tíggju dagar

**Tosað verður nú í krókunum um, at tíðarfreistin ikki varð hildin, tá Frithleif Olsen varð skotin upp sum formansevni**

Hvussu nógv eru tíggju dagar? Hetta tykist vera ein av spurningunum, sum nakrir av luttakarunum á komandi aðalfundinum í hesum døgum royna at greiða.

Orsøkin er, at tað nú er onkur, sum vil vera við, at tíðarfreistin fyri uppstillingina til formanspostin ikki varð yvirhildin, tá Frithleif Olsen varð skotin upp seinasta hóskvøld.

Í Fráboðanini til feløgini um aðalfundin stóð annars at lesa, at uppskot til nevndar- og formansval skuldu vera skrivstovuni í hendi 10 dagar undan aðalfundinum, og í seinasta lagi 5. februar.

Soleiðis er freistin, sum feløgini hava fingið upplýst yvirhildin, tí uppskoti var FSF í hendi hósdagin, 5. februar. Spurningurin er so, hvørt FSF hevur roknað rætt, tá tey í fráboðanini siga, at 5. februar er rætti dagurin. Aðalfundurin er sum kunnugt 14. februar, og verður hesin dagurin roknaður við í tíðarfreistini, so er 5. februar seinasti dagurin. Skulu 10 dagar roknast sum 10 samdøgur, so er støðan tó ein onnur. Aðalfundurin byrjar nevnliga kl. 10 um morgunin, og so vildi hósmorgunin verið rætta tíðarfreistin.

Tað tykist tó ikki, sum um hetta fer at hava nakra ávirkan á aðalfundin. Nevndarfundur var í FSF fríggjadagin, har frammanfyristandandi aðalfundurin var á skránni, og tá einki er komið haðani um, at uppskot ikki eru góðtikin, má væl saktans gangast út frá, at øll uppskotini eru góðtikin. Eisini uppstillingin av Frithleifi Olsen.

Sum vit hava skilt tað, so var ætlanin annars, at uppskot um útsetan av aðalfundinum skuldi setast fram við teirri grundgeving, at einki lógligt formansevni var í uppskoti. Spurningurin vildi tá verið, um Dánjal Andreasen so skuldi hildið fram fyribils í sessinum, ella um onkur av hinum nevndarlimunum hevði tikið við, fram til nýggjan aðalfund, men tann spurningurin tykist tó bara vera av hypotetiska slagnum.





*Talan var um satt antiklimaks hjá Stjørnuni, sum hesaferð spældi fyri nærum tómari høll, men hetta ávirkaði tó á ongan hátt úrslitið*

Kyndil-Stjørnan 18-40 (4-23)

# Keðiligasti dysturin í mannaminni

**Teir fáu áskoðararnir, ið høvdu leitað sær niðan í høllini á Hálsi týskvøldið at síggja dystin millum botnliðið Kyndil og oddaliðið Stjørnuna í bestu kvinnudeildini, fingu skorið út í papp, hvussu stórur munur er millum topp og botn**


HONDBÓLTUR
*Terji Nielsen*


Tað má hava verið ein undarlig kensla hjá klaksvíkskvinnum at spæla fyri bert einum hálvthundrað áskoðarum í høllini á Hálsi týskvøldið, bert trý samdøgur eftir at tær í somu høll og framman fyri okkurt um túsund áskoðarum vunnu steypafinaluna á VB. Hjá venjaranum eigur tað eisini at verða munandi léttari at gera leikararnar uppsettar til eina steypafinalu heldur enn ein dyst móti avgjørda botnliðinum. Men undir øllum umstøðum tóktist tað tó ikki sum um at Stjørnan ikki vóru klárar til dystin týskvøldið, tí tær gjørdu bart beinanvegin.

### 4-23 í hálvleikinum!

Stjørnan, ið var uttan leikbannaðu Anniku Ljósstein, vísti frá byrjan, at tær vóru komnar til Havnar at tryggja sær tvey týðandi stig í stríðnum um føroyameistaraheitið. Taktikkurin var einfaldur - at renna Kyndil um koll, og tað lukkaðist eisini til fulnar. Fekk ikki talið av málum hjá Stjørnuni, ið komu eftir skjótálop, við, men tað mundi liggja um helmingina av teimum íalt 40 málunu, ið tær skoraðu týskvøldið.

Serliga hjá Báru Skaale Klaksstein á høgra vongi gekk væl í byrjanini, og fyrstu tjúgu minuttirnar skoraði hon ikki færri enn fimm ferðir! Bára hevur ein eginleika, ið bert fáir hondbóltsleikarar her á klettunum hava, nevnliga at hon ferð við fullari ferð fram eftir, tá ið mótstøðuliðið avsluttar. Hetta ger, at um mótparturin misnýtir sína skotroynd, so er hon nærum altíð klár í einum møguligum skjótálopi.

Undir øllum umstøðum gjørdist tað tó beinan vegin greitt, at í dystinum týskvøldið fór ongin spenningur at verða um úrslitið. Longu tá ið eitt korter var leikt av dystinum, hevði Stjørnan lagt seg á odda 12-1, og tá var dysturin langt síðani avgjørdur.

Kyndil hevði einki at bjóða uppá, og tað er neyvan at gera ov nógv av, tá mett verður, at tær settu nýtt føroyskt met í feilavleveringum týskvøldið. Ótrúliga nógvir bóltar vóru blakaðir út av síðulinjuni, í beinuni á viðleikarum ella beint í hendurnar á mótstøðuleikarum. Tá ið tað so hendingaferð eydnaðist teimum grønklæddu at spæla seg til málmøguleikr, vóru tær alt ov óneyvar. Av somu orsøk vaks munurin bara millum liðini, og tá ið komið var til hálvleiks, hevði Stjørnan skorað ikki færri enn 23 ferðir, meðan heimaliðið Kyndil bert fýra ferðir hevði megnað at fingið bóltin í netið aftan fyri Lidiju í málinum hjá Stjørnuni!

### Eykaleikarar fingu roynt seg

Í seinna hálvleiki valdi venjarin hjá Stjørnuni, Svein Rógvi Nielsen, at spara fleiri av sínum stuðulsleikarum, og samstundis fekk hann roynt fleiri av vanligu eykaleikarunum, ið annars ikki fáa so nógva spælitíð. Unga Durita Ljósstein kom inn sum spælskipari, Maria við Neyst kom inn á vinstra vong, og Súsanna Jacobsen fekk roynt seg á høgra vongi. Eisini fekk Lidija í málinum sess á beinkinum seinastu tíggju minuttirnar, og í hennara stað kom 16 ára gamla Jancy Joensen. Tað kom Jancy bara væl frá, tí millum annað eydnaðist tað henni at taka eitt brotskast frá Lotte Sørensen.

Tað at Stjørnan sendi so nógvar eykaleikarar á vøllin eftir steðgin, blandað saman við at spenningurin var farin úr dystinum, gjørdi at Kyndil nú heldur betur tørn. Munurin millum liðini vaks ikki nakað serligt í seinna hálvleiki. Tað tóktist bara sum um liðini bæði bara bíðaðu eftir, at dómararnir fóru bríksla dystin av - lat tað bara verða sagt beinan vegin, tað vóru ikki bara leikararnir á vøllinum, ið bíðaðu eftir seinasta bríkslinum í dystinum, tað gjørdi hvør einasti áskoðari eisini! Tá ið tað forloysandi bríksli so at enda kom, vísti máltalvan, at heimaliðið Kyndil hevði fingið 18 mál, meðan gestirnir úr Klaksvík høvdu 40 mál í skjáttuni.

### Himmalvíður munur á liðunum

Tað var sum áðurnevnt stórur munur á liðunum báðum. Um Stjørnuna kann sigast, at tær høvdu nóg góð skjótálop, høvdu ferð á í sínum álopsspæli, og tær vóru avgjørdar í sínum atsóknum upp á mál. Í verjuni vóru tær væl skipaðar og kontantar, uttan tó at leika hart. Hinvegin kann sigast um Kyndil, at verjan var sera óskipað, serliga fyri steðgin, sera lítil ferð var á álopsspælinum, og tær vóru alt ov hálvhjartaðar og óneyvar í sínum skotroyndum. Hagani skal koma eitt gott ráð til venjaran hjá Kyndli undan næstu venjing hjá liðnum: Brúka næstu venjingarnar til venja avleveringar og at læra at lofta!

### Dysturin í tølum

**Kyndil-Stjørnan 18-40 (4-23)**

**Kyndil:** Randi Wardum 5, Sabine Frølund 4, Lotte Sørensen 3(1), Annika Thomsen 3, Linda Weihe 1, Ann-Mari Wang 1, Anja Heinadóttir 1

**Stjørnan:** Katarina Stepanov 9(1), Alina Olaru 7(1), Bára Skaale Klakkstein 6, Anna Kristina Samson 6, Una Olsen 4, Joan M. Djordjevic 3, Durita Ljósstein 2, Maria við Neyst 2, Súsanna Jacobsen1

**Brotskøst:** Kyndil 2(1), Stjørnan 3(2)

**Útvísingar:** Kyndil 1

**Dómarar:** Jákup Símun Simonsen og Rúni Djurhuus, H71: Dysturin var eitt gott korter seinkaður, tí dómararnir komu ov seint. Sum dysturin gekk høvdu teir, eins og tey allarflestu í høllini, trupult við at halda konsentratiónina, og tí gloymdu teir onkrar heilt upplagdar avgerðir. Tað er heldur ikki serliga gløgt av einum dómara, tá ið hann skal geva einum venjara átalu fyri at brúka seg, at dómarin bara steðgar dystinum, vendir sær til venjaran og sigur: H*** Kj***

# Hegga Samuelsen venja Fram

**Fram hevur fingið sær royndan leikandi venjara, nú felagið aftur skal royna seg í triðju deild**


VENJARI
*tíðindaskriv*


Á leikarafundi í Framhúsinum 10. februar, kom nýggi venjari felagsins á gátt at heilsa leikarunum. Vágamaðurin Jógvan "Hegga" Samuelsen, er maðurin, ið skal standa fyri 1. liðnum hjá Fram hettar kappingarárið, eftir at felagið fluttið upp úr 4. deild í fjør.

Fundurin byrjaði kl. 20, har Hegga legði út, við at greiða eitt sindur frá um seg sjálvan, ætlanir fyri venjingina og kappingarárið. Eisini verða nøkur nýggj nøvn í hópinum í ár. Úr Vágoynni koma royndir menn, sum millum annað hava verið á U-landsliðunum og 1. deild hjá FS Vágum í fjør.

Hegga Samuelsen er sjálvur royndur maður innan fótbóltin. Hann hevur leikt við SÍF, FS Vágum, HB og ÍF Føroyum í Danmark, har hann sum leikandi venjari førdi felagið til uppflyting.

Hegga er eisini settur sum leikandi venjari hjá Fram. Og vónirnar frá nevndini og leikarum eru góðar fyri kappingarárið, sigur Fram at enda í tíðindaskrivi.